**Bjarni Hammer**
**løgtingsmaður**

**Nr. 23/2019**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um umskipan av Strandfaraskipum Landsins, settur landsstýrismanninum í samferðslumálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at umskipa Strandferðsluna og leggja hana í eitt alment partafelag?
2. Um so er, kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu hann væntar, at hetta fer at ávirka ferðafólkaflutningin og farmaflutningin hjá Strandferðsluni í framtíðini?

**Viðmerkingar:**

Hósdagin í farnu viku umrøddi Løgtingið eitt uppskot frá Tjóðveldi um at leggja eina miðvísa ætlan fyri at endurnýggja flotan hjá Strandferðsluni. Í hesum sambandi segði tingmaður Fólkafloksins, Christian Andreasen, at hann metti, at samgongan átti at umhugsa at umskipa Strandferðsluna og leggja hana í eitt alment partafelag.

Christian Andreasen er tingbólkaformaður Fólkafloksins, og tí má roknast við, at útsagnir hansara umboða almennu hugsan floksins á tingi. Slíkar útsagnir skapa ótryggleika millum fólk, sum dagliga ferðast við Strandferðsluni og sum hava tørv á jøvnum og góðum ferðasambandi. Tí heiti eg á landsstýrismannin um at greiða frá, hvørjar ætlanir hann hevur viðvíkjandi umskipan av Strandferðsluni, og hvussu ein møgulig umskipan fer at ávirka flutningin hjá Strandferðsluni í framtíðini.

**Á Løgtingi, 25. novembur 2019**

Bjarni Hammer